# Vágbingur og næstforkvinna í SF í Rødovre

**Fyri 29 árum síðani fór tann tá 17 ára gamla Marjun Mohr Augustinussen úr Vági til Danmarkar at arbeiða og royna okkurt nýtt. Í dag er hon kommunalpolitikari og næstformaður í SF í Rødovre. Kommunan hevur eina fíggjarætlan uppá 3 milliardir. – So kann ein annars samanbera við føroyska búskapin, sigur Marjun Augustinussen hugsunnarsom**

ÚTISETI VITJAR HEIM
*Dagfinn Olsen*

Føroyingar eru allastaðni! Hetta verður ofta staðfest, og møguliga er nakað í hesum.

Fyri stuttum hevur Marjun M. Augustinussen vitjað heima í Vági. Hon býr í dag í Rødovre í Danmark.

Eftir realprógv fór tann tá 17 ára gamla Marjun til Danmarkar. Hetta var í 1972. Hon vildi royna okkurt nýtt og hon átti ein mammubeiggja í Albertslund, so hon fór til Danmarkar. Hon starvaðist millum annað á hotelli, reinsaríi og á sjúkrahúsi. Seinni er hon vorðin sjúkrahjálpari.



*Marjun M. Augustinussen fór úr Vági í 1972. Hon er í dag býráðslimur í Rødovre og næstformaður í SF. Her er hon avmyndað í stovuni í Vági við Vágseiðið í baksýni í stovuvindeyganum*

## Stillaði upp

Marjun giftist donskum manni og eiga tey tvey børn. Síðani 1986 hevur Marjun búð í Rødovre. Hon hevur altíð havt áhuga fyri politikki og hon kom í Rødovre í politiskt merkt umhvørvi.

Hon gjørdist í 1986 limur í SF, Socialistiskt Folkeparti, og tvey ár seinni gjørdist hon næstformaður í SF í Rødovre. Í 1994 stillaði Marjun M. Augustinussen upp til kommunuvalið, kom inn, og hevur verið inni síðani.

Politiska arbeiðið er strævið, heldur Marjun, sum hevur sítt borgarliga starv umframt. Hon hevur havt og hevur fleiri nevndarsessir. Hon hevur verið í sosialunevnd og er nú í mentanarnevndini og er forkvinna í nevndini, ið danir nevna teknik og miljø. Har verður arbeitt við húsum, kloak, vegum og øðrum.

Kvinnur verða ikki ofta settar í samband við tøkni, men Marjun sigur til hetta, at sum politikari má ein hava áhuga fyri øllum.

Hon nevnir fegin nøkur av seinastu arbeiðsúrslitunum. Tað er eydnast at steðgað vandamiklari spræning av jørðini, har vandamikil evni síðani treingja niður í grundvatnið. Eisini er komið væl áleiðis við eini ætlan um vistfrøðiligan mat til barnagarðar í kommununi.

Í mentanarnevndini hava tey júst lagt síðstu hond á at byggja eitt savn — museum. Tað var Henry Heerup, ið læt sínar ognir og listasavn til kommununa. Treytin var, at eitt savn varð bygt til hetta, og tað er nú gjørt.

– Tey fyrstu 4 árini fara við at læra mannagongdir. Men síðani kemur ein inn í arbeiðið og gerst veruliga bitin av tí, sigur Marjun og upplýsir, at Rødovre Kommuna hevur eina fíggjarætlan uppá 3 milliardir.

– So kann ein annars samanbera við føroyska búskapin, leggur hon hugsunnarsom afturat.

## Mentanarhvøkk

Marjun M. Augustinussen viðgongur, at hon saknar Føroyar og familjuna av og á. Men hon vitjar heim ofta. Tó so, henni dámar væl í Danmark og danir.

– Mær dámar væl teirra máta at vera uppá, sigur Marjun, sum hevur búð í Danmark útvið 29 ár.

Marjun leikti hondbólt við VB, áðrenn hon leitaði út í heim. Hon metir, at enn sum áður, fyllir VB nógv í heimbygdini og hjá teimum, ið har búgva.

– Onkutíð er tað, sum eg ikki havi verið burturi, tá eg aftur vitji heima. Ikki nógv er broytt, sigur Marjun, sum tó staðfestir, at nógv nýggj hús eru.

– Eg var heima, tá VB gjørdist føroyameistari. Tá veitslan var, var tað júst sum fyrr, og eg kendi meginpartin av fólkunum, greiðir Marjun Augustinussen frá.

Hóast fáu broytingarnar heima, so heldur hon, at tað hendir heldur minni nú, enn fyrr.

– Men kanska er tað tí, at eg eri vorðin eldri, smáflennir Marjun.

Hon er eisini millum teirra, ið er heldur órógvað av vánaligu burðartølunum í heimbygdini og oynni sum heild.

Sjálv býr Marjun í dag í eini kommunu við 37.000 íbúgvum. Hon hevur ongantíð havt trupulleikar av at vera føroyingur í Danmark.

Tá Marjun fór til Danmarkar í 1972, fekk hon tó nakað av einum mentanarhvøkki.

– Eg skilti ikki altíð ironiina, men vil tó ikki siga, at eg hevði trupult við at fóta mær. Eg var nógv millum føroyingar í byrjanini, men seinni giftist eg og fekk børn, greiðir Marjun frá.

Kommunuval verður aftur tann 18. november og Marjun Mohr Augustinussen hevur mót uppá framtíðina og ætlar sær at stilla uppaftur og royna enn einaferð. Tíðin fer so at vísa, hvørt tað eydnast henni at vinna pláss millum teirra, ið koma at standa við róðri í Rødovre komandi valskeið.

### FAKTA

Rødovre Kommuna hevur 37.000 íbúgvar.
Býráðið er sett saman soleiðis. 9 umboð frá Socialdemokratinum, 3 umboð frá Konservativu, 2 umboð frá Vinstra, 2 umboð frá Dansk Folkeparti, 2 umboð frá SF og eitt umboð frá Radikalu.
Samgonguna mynda SF og Socialdemokratarnir.
Fíggjarlóg: Uml. 3 milliardir.
Alt øki er nýtt og einki er eftir at byggja á.
Rødovre hevur í ár verið kommuna í 100 ár.
Til ber at vitja heimasíðuna www.roedovrekom.dk

# Samanstoytur



**Tveir bilar stoyttu saman á smala vegastrekkinum við Tjaldavík týsdagin**

FERÐSLUÓHAPP

Týsdagin í síðstu viku stoyttu tveir bilar saman við Tjaldavík í Suðuroynni. Vegirnir eru manga staðni sera smalir á leiðini og eini bilurin fór av kós. Førarin misti valdið á bilinum, men veit annars ikki júst, hvat orsøkin var til, at bilurin ikki vildi sum førarin.

Tá so ein mótkoyrandi bilur kom ímóti, og ikki nógv pláss er á vegnum, so var samanstoyturin ikki at koma uttanum. Skaðið kom á bilarnar. Í eina bilinum var bert førarin og í hinum førarin og eitt barn. Størri persónskaði stóðst ikki av, men smærri snuddir.

**do**

VIÐMERKING

# Sjálvsagt kann kunning altíð betrast

**Tí er hon nú løgd á heimasíðuna hjá FF**



**Óli Jacobsen**

Fyrst skal sigast, at tað er gleðiligt at Sosialurin tekur mál upp sum viðvíkja fiskimonnum, og vónandi kann slík skriving gera sítt til at nakað endir.

Bert nakrar fáar viðmerkingar:

1.
Hóast fiskimannafelagið man vera tað felag sum best kunnar sovæl fiskimenn sum almenningin um síni sjónarmið, so kann hon altíð gerast betri. Tí hava vit eisini nú fingið eina heimasíðu, har m.a. kunning um rættindi hjá fiski- og sjómonnum, tá teir gerast sjúkir ella koma til skaða, liggur fast inni.

2.
Sum sagt setti eg í 1994/95 sum landsstýrismaður eina nevnd at endurskoða vanlukkutryggingarlógina, sum væl nú má fara at koma fyri tingið. Hon kemur at loysa stóran part av teimum trupulleikum, sum eru umrøddir, m.a. við at geva eina støðuga veiting fyri mist vinnuføri.

3.
Hvussu tungir almennir nyndugleikar annars eru at dansa við skal verða lýst við einum dømi: Eg tók í 1998 stig til at seta eina nevnd at koma við uppskoti um eina nýggja dagpengalóg. Hetta arbeiðið er loksins liðugt og hevur verið hjá feløgunum til ummælis. Sjálvur havi eg meira enn 20 árs royndir við verandi dagpengalóg og hevur FF út frá hesum royndum gjørt tilmæli um broytingar í uppskotinum. Tað er ikki eitt komma tikið til eftirtektar!

Bert eitt dømi: Lógin ásetir eina freist uppá 12 dagar at lata inn umsókn. Verður hon ikki hildin, fæst bert frá tí degi, umsóknin er latin inn. Aftaná nevndu 12 dagar og innan 8 vikur kunnu undir serligum umstøðum gerast undantak. Men so verður sagt í viðmerkingunum:

*“..um ein arbeiðsgevari ella ein lækni liggur og bølir á umsóknina og ikki sendir hana víðari, sum lovað, so er hetta ikki nóg góð grundgeving fyri at víkja frá umsóknarfreistini”.*

Her nýtast væl ongar viðmerkingar! Hetta lýsir meira enn nakað annað hugburðin í “toppinum” móti tí “meiniga manninum”. Tí har høvdu teir neyvan sett slíkar treytir um tað vóru teirra egnu viðurskifti sum skuldu lógfestast. Vit hava roynt at vísa á hvussu órímilig henda reglan er. Men tað hevur verið sum at sletta vatn á gás.

Hetta og nógv annað kann lesast á Heimasíðuni hjá Fiskimannafelagnum: www.fiskimannafelag.fo



# Nýggj Vanlukkutryggingarlóg á veg

**Eftir summarfrítíðina í ár verður nýggj Vanlukkutryggingarlóg løgd fyri tingið. Samstundis kemur lógaruppskot um endurgjald**

ÓARBEIÐSFØRI
*Turið Kjølbro*

Nøkur ár eru síðani arbeiðið við at gera uppskot um nýggja vanlukkutryggingarlóg byrjaði. Fyri trimum árum síðani varð uppskot um nýggja Vanlukkutryggingarlóg lagt fyri tingið, men tá val varð útskrivað í úrtíð, datt uppskotið burtur.

– Lógaruppskotið til nýggja vanlukkutryggingarlóg er liðugt frá Almanna- og heilsumálastýrinum, men tað er ikki endaliga liðugt viðgjørt á lógardeildini. Helst verður tað tí ikki lagt fyri tingið fyrr enn beint eftir summarfrítíðina, tí tað eigur at fylgjast við lógini um endurgjald, og hon verður ikki framløgd fyrr enn eftir summarfrítíðina, sigur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í almanna- og heilsumálum.

Høvuðsbatarnir í nýggju lógini eru, at skotið verður upp at veita hægri endurgjaldsupphæddir. Einstakir skaðar, t.d. lyftiskaðar, sum fyrr ikki hava verið fevndir av lógini, verða eftir uppskotinum fevndir av nýggju lógini.

– Og sjálvsagt verða allar mannagongdir skipaðar í samljóði við aðra løggávu í landinum. Allir arbeiðsgevarar hava skyldu at tryggja sítt arbeiðsfólk.

– Hvussu mett verður um skaðar, og hvussu víttfevnandi teir eru, er ikki ein politiskur spurningur. Tað verður avgjørt av einum fakligum ráði. Politiski myndugleikin kann ikki leggja seg út í avgerðirnar hjá Vanlukkutryggingarráðnum, sigur Helena Dam á Neystabø.

*– Fiskimannafelagið átti at gjørt eitt nógv størri arbeiði at kunna sínar limir um, hvørji rættindi tey hava í sambandi við til dømis vanlukku, sigur Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna*



## Fakfeløgini stóra ábyrgd

Landsstýriskvinnan í almanna- og heilsumálum metir, at tað liggur ein stór ábyrgd á fakfeløgunum at upplýsa sínar limir.

– Eg meti, at fakfeløgini, t.d. Fiskimannafelagið átti at gjørt eitt nógv størri arbeiði at kunna sínar limir um, hvørji rættindi tey hava í sambandi við til dømis vanlukku, og veitt sakkøna hjálp, tá ið á stendur hjá limi fakfelagsins. Eisini áttu fakfeløgini at ráðgivið sínum limum, hvussu teir kunnu tryggja seg sjálvar móti eitt nú vanlukku.

Undanfarni landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum, Kristian Magnussen, eftirlýsir í viðtali í blaðnum í gjár, eini kunngerð um vard størv. Fyrr enn kunngerðin kemur, fær Almannastovan ikki umsitið lógina um vard størv á nøktandi hátt.

– Arbeitt verður í løtuni við spurninginum um vard størv og endurbúgving. Hetta eitt øki, sum í løtuni verður upprioriterað á Almannastovuni, og innan 14 dagar verður ein reglugerð liðug á økinum. Megintrupulleikin er kortini at útvega neyðuga nógv arbeiðspláss til vard størv. Vit áttu tí at umhugsað at álagt øllum almennum arbeiðsgevarum, sum hava fleiri enn eitt ávíst tal av fólki í starvi, at havt í minsta lagi eitt vart starv. Somuleiðis átti tað at áligið kommunalum arbeiðsgevarum at útvega vard størv. Hetta er ein spurningur, sum eg ætli mær at taka upp og fáa greiðar reglur um, sigur Helena Dam á Neystabø.

**Viðmerkingar til samrøðuna við Leiv Egholm í blaðnum í gjár**

# Munandi betri sømdir

**Danir hava greiðar reglar at arbeiða eftir, tá ið talan er um óarbeiðsføri og endurgjald**

ÓARBEIÐSFØRI
*Turið Kjølbro*

Sambært útrokningum sum danska Arbejdsskadestyrelsen hevur gjørt fyri okkum, fær ein dani, ið er komin álvarsliga til skaða av arbeiðsvanlukku, munandi betri sømdir enn ein føroyingur. Reglurnar um endurgjald fyri mistan arbeiðsførleika eru í grein 32 í lógini um trygging ímóti fylgjum av arbeiðsskaða, har endurgjald verður veitt fyri varandi miss av arbeiðsførleika. Avgerðin um endurgjald fyri mistan arbeiðsførleika verður tikin eftir, at tann skaddi er liðugur við viðgerð á sjúkrahúsi, uppvenjing ella endurbúgving. Fyrr enn tá er ikki grundarlag at meta um heilsustøðuna og framtíðar vinnumøguleikar hjá viðkomandi. Avgerðin skal í tann mun tað ber til verða tikin innan eitt ár ella í seinasta lagi tvey ár eftir, at skaðin er meldaður. Endurgjaldið er treytað av varandi inntøkumissi ella inntøkuminking. Verður tapið av arbeiðsførleika mett til at vera undir 15 prosent, verður endurgjald ikki veitt. Verður tapið av arbeiðsførleika mett til undir 50 prosent, verður endurgjaldið veitt í einum. Verður tapið av arbeiðsførleika mett til 50 prosent ella meiri verður endurgjaldið grundarlag undir eini veiting, sum verður goldin árini framyvir. Møguleiki er tá at kapitalisera tann partin av veitingini, sum svarar til ein arbeiðsførleikamiss upp til 50 prosent. Lógin heimilar at taka eina fyribils avgerð um endurgjald fyri arbeiðsførleikamiss, um arbeiðsstøðan hjá viðkomandi ikki er greið. Slíkt endurgjald verður altíð veitt yvir eitt longri tíðarskeið.

Endurgjald verður roknað við støði í arbeiðsførleikamissinum, sum er fastsettur, og árslønini hjá viðkomandi árið fyri ólukkan hendi. Sambært grein 41 í lógini, stk. 3, kann árslønin ikki setast hægri enn eina ávísa upphædd, sum verður sett á hvørjum ári, uttan mun til, um viðkomandi hevur vunnið eina miljón krónur um árið ella meir. Í 2001 ár er upphæddin sett til 345.000 krónur. Sambært grein 32, stk. 5 verður endurgjald veitt fyri fýra fimtapartar av arbeiðsførleikamissinum. Verður endurgjald veitt í mánaðarligum útgjaldi, verður tað goldið til viðkomandi er 65 ár, fyri nýggjar skaðar og yngri persónar. Síðani verður veitingin avloyst av eini upphædd, sum verður goldin í einum og sum er fýra ferðir árliga veitingin.

## Fortreytir

Taka vit sum dømi, at arbeiðsførleikin er niðursettur við 100 prosent, 65 prosent og 50 prosent, verður veitingin, sum víst á omanfyri, goldin í mánaðarligum útgjøldum. Støddin á endurgjaldinum veldst um, í hvussu nógv ár hon skal rindast. Er tann, ið endurgjald skal hava, 56 ár gamal tá endurgjald skal veitast fyrstu ferð, verður tað goldið í 9 ár, til viðkomandi er komin til fólkapensjónsaldur, sum er 65 ár í Danmark. Tá so viðkomandi er vorðin 65 ár, verður ein endalig veiting veitt, sum er fýra ferðir árliga veitingin. Endurgjaldsupphæddirnar verða endurskoðaðar á hvørjum ári, sambært lønarstøðinum í Danmark.

Hevur viðkomandi, sum skal hava endurgjald, vunnið meiri enn 345.000 krónur, verður upphæddin kortini sett til 345.000 krónur. Er arbeiðsførleikin heilt burturi, fær viðkomandi 276.000 kr. í 9 ár umframt eina endaliga veiting, svarandi til í alt 3.588.000,- krónur. Er missurin av arbeiðsførleika mettur til 65 prosent, fær viðkomandi 179.000 krónur í 9 ár umframt eina endaliga veiting, svarandi til í alt 3.049.000,- krónur. Er missurin av arbeiðsførleika mettur til 50 prosent, fær viðkomandi 138.000 krónur í 9 ár umframt eina endaliga veiting, svarandi til í alt 1.794.000,- krónur.

Leggjast kann afturat, at endurgjald fyri miss av arbeiðsførleika bert er ein av veitingunum sambært lóg um trygging ímóti avleiðingum av arbeiðsskaða. Tey, ið fáa ein arbeiðsskaða, har misti arbeiðsførleikin verður mettur til 100 prosent, 65 prosent og 50 prosent, fáa vanliga eisini eitt endurgjald fyri varandi mein umframt.